# Dagbókin - 9.b í Venjingarskúlanum skrivar:

friggjadagur 4.okt. 2002

**Góða dagbók!**

Í dag fór eg oman til Maluna. Vit skuldu í býin at keypa klæðir til í morgin. Eg eri SO spent, tí í morgin skulu vit á DJ-show, eg og Malan.

Vit fóru also í býin at keypa klæðir, og báðar keyptu ein fittan topp. Eisini keypti eg einar nýggjar buksur . Toppurin hjá mær er Zebra-líknandi, og buksurnar eru svartar. Í býnum hittu vit Káru. Hon fylgdist við Lars, og vit stóðu eina løtu og prátaðu. Kára ætlaði sær eisini á DJ-show í morgin, so vit hava avta-laðu at fylgjast.

**Góða nátt.....**



leygardagur 5. okt 2002 (kl. 19.00)

**Góða dagbók!**

Í kvøld verður tað!!!! Eg eri MEGA spent, ja eg kann slett ikki bíða. Um eina løtu fari eg oman til Maluna, har vit fara at gera okkum klárar til at fara í býin. Eg taki sminkupungin við, og so fara vit at sminka okkum og seta hárið, áðrenn vit fara víðari oman til Káru. Og síðani gongur leiðin niðan í Badmintonhøllina.

Eg má fara, tí Malan ringir....



sunnudagur 6. okt 2002

**Góða dagbók!**

Tað var nógv stuttligari á DJ-showinum, enn eg helt , tað fór at verða. Í byrjanini var tað rotið, tí har vóru so fá fólk. Men eftir ein hálvan tíma var næstan full høll, og so bleiv tað stuttligt. Har vóru dansigentur, ljósshow og nógvir lekrir dreingir (he, he..)

Kára var saman við Sjúrður, og Malan var saman við Claus. Eg fekk eisini sjeik. Hann eitur Bergur og er vinmaður Claus. Hann er Sooooo fittur. Eg vóni, at hann fer at ringja til mín, tí eg vil og má síggja hann aftur. Á konsertini dansaðu vit allatíðina, og tað var sooo stuttligt..

Tá klokkan var okkurt um 2.00, fóru Malan, Kára og eg oman á fót-bóltsvøllin. Har hittu vit Sjúrða, Claus og Bergur. Vit prátaðu eina løtu, síðani fóru vit inn í høllina at dansa.

Nakað seinni kom Bergur yvir til mín og segði, at hann vildi tosa við meg. Eg bleiv eitt sindur nervøs, men fór við. Vit fóru útum, og har segði hann, at honum dámdi meg!!! Eg føldi, at eg rodnaði, og tí var eg glað fyri, at tað var myrkt uttanfyri. Eg skundaði mær inn aftur, fann Maluna og Káru og greiddi teimum frá tí, ið Bergur hevði sagt.

Tá vit seinni sóu Bergur, Claus og Sjúrður, tordi eg næstan ikki at hyggja upp á Bergur.

Seinni var eg saman við Bergur, og tá ið teir spældu síðsta sang (o.u. kl. 3.30), dansaðu vit bæði tætt saman.

Síðani varð konsertin liðug, vit fingu taskurnar og spákaðu oman í býin. Tá vit høvdu gingið eina løtu runt og prátað við fólk, fóru vit til hvør til sítt. Eg var glað og kundi næstan ikki sovna, tá ið eg kom heim. Eg hugsaði bara um Bergur og um, nær vit munnu fara at síggjast aftur.

Ja, eg hugsi um hann enn.............


<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag


## Vit skriva:

Í okkara fyrsta <ph_1> blaði, hava vit valt at taka evnið upp, sum eitur fartelefonir.

Seinastu árini hevur fartelefonin veruliga tikið dik á seg, og nærum øll ganga og mala við eini fartelefon í dag.

Fartelefonir er nakað, sum er eitt »must« - trendið, hip, in, smart. Sms-boð, teir nýggjastu ringitónarnir, bílætaboð og annað fer við nógvari tíð, tá tosað verður um fartelefonina hjá ungdómi í dag.

Men treyðugt so. Fartelefonin er meira enn so hent. Fyri nøkrum mánaðum síðani var eitt ferðsluóhapp á Oyggjarvegnum. Bilurin var farin so langt oman í bøin, at um annar av teimum báðum, sum vóru í bilinum ikki hevði eina fartelefon, so høvdu teir helst ikki verið funnir fyrr enn einaferð - og tá hevði tað kanska verið nógv verri statt enn áðrenn.

Hvat er tað, sum ger, at fartelefonin er vorðin til eitt neyð-turviligt amboð í dagsins samfelag? Fyrr hevur tað ikki verið soleiðis, at tú hevur skulað verið til at fáa fatur á 24 tímar um døgnið. Fyrr var tað nóg mikið við eini fastnettelefon, og var tú ikki heima, so var spell. So mátti bara bíðast og ringjast aftur seinni.

Ivi er ikki um, at mong foreldur munnu argast inn á telefon-rokningina síðani fartelefonin hevur fingið ein so høgan status her á landi. Dýrari er at ringja á eina fartelefon enn eina fast-nettelefon, so skjótt er, at tele-fonrokningin verður heldur hægri enn ætlað.

Til ber eisini at fara langt aftur í tíðina, tá bara ein telefon var í bygdini. Í dagsins samfelag ber illa til at ímynda sær, hvussu hevur borið til at samskifta. Men tey, ið livdu tá í tíðini, kláraðu seg fínt. Tað var ikki nakar trupulleiki ikki at eiga eina telefon.

So eru tað eisini nøkur, sum í dag ikki eiga eina fartelefon. Onkur undrast kanska á, hvussu ein so kann fáa fatur á viðko-mandi, men satt at siga, man tað ikki vera so ringt, sum ein einaferð vil gera tað til at vera. Áhaldni er eitt gott boð.

Ein brennandi spurningur er so, um tað nú er so hip, smart, in og kul at hava eina fartelefon. Hvat er tað, sum ger tað so smart, at ganga og tosa í eitt lítið apparat, mitt á alfara vegi, blindur fyri øllum tí, sum hendir rundan um teg? Er tað ikki kan-ska eitt sindur meira »yt« enn nakað annað? »Ja, mamma, eg skal keypa mjólk og breyð!!!«.

Nakað annað, ið er av alneyðugum týdningi er, at min-nast til at sløkkja telefonina. At kenna síni mørk. Vita, at nú hóskar tað seg ikki, at hava fartelefonina tendraða. Í øllum førum ikki ljóðið. Havi verið úti fyri, at ein fartelefon hevur ringt yvir grøvini, og tað er ALT annað enn sjarmerandi. Tá má ein veruliga seta spurningin: Hvar er skommin í fólki?

Okkara boðskapur er greiður: Fartelefonin kann saktans vera eitt hent amboð, men kenn tíni mørk, og lær teg eisini at binda frið og lat telefonina hvíla og vera sløkta viðhvørt.

<ph_1>



Vangamyndin:  Hjalgrím Elttør

# Hjalgrím vil vera í KÍ

**19 ára gamli klaksvíkingurin Hjalgrím Elttør hevur av álvara sligið sítt navn fast innan føroyska fótbóltsheimin. <ph_1> hevur hitt henda unga og fryntiliga mannin til eitt fótbóltsprát**

Hjalgrím hevur fingið eina lítla fríløtu frá sínum dagliga starvi á Statoilstøðini í Klaksvík til hetta prátið. Og tað sást á honum, at honum dámar fótbóltsprát. Hjalgrím hevur altíð raðfest fótbóltin ovarlaga, fyri ikki at siga ovast.

- Ein forsømdi ongantíð fótbóltin. Eg havi forsømt nógv annað orsakað av fótbóltinum, men so gott sum ongantíð fótbóltin orsakað av øðrum. Um eg hevði tvey at velja ímillum, so valdi eg altíð fótbóltin. Men tað er broytt eitt sindur í dag. Ein hevur fingið onnur ting at hugsa um eisini, so raðfestingin er øðrvísi, sigur Hjalgrím, men hann dylir ikki fyri, at fótbólturin framvegis fer við sera nógvari tíð.

- Um ein tekur arbeiðið, fótbóltin og so at ein er forlovaður, ja, so er ikki tíð til nógv annað, sigur Hjalgrím, sum tá hann var yngri eisini royndi seg sum bæði hondbólts- og flogbóltsleikara. Men hann var noyddur at velja eina ítróttargrein, tá tað bleiv ov krevjandi, og tað bleiv sjálvandi fótbóltin hann valdi.

Hjalgrím var seks ára gamal, tá hann byrjaði at venja fótbólt. Tað var við pinkulingunum í 1989. Men hann hevur altíð spælt bólt.

- Mamma plagar at siga, at eg var nóg illa byrjaður at ganga fyrstu ferð, eg sparkaði ein bólt, sigur Hjalgrím smílandi.

Upp gjøgnum árini hevur Hjalgrím ment seg sera nógv sum fótbóltsleikari. Fyrstu ferð hann var við til at vinna eitt meistaraheiti fyri KÍ, var í 1993. Tað var við smápiltum. Síðani hevur Hjalgrím spælt við øllum deildunum uppeftir hjá KÍ, inntil hann byrjaði at venja við fyrstu deildar liðinum sum 16 ára gamal.

Hann greiðir frá, at hann hevur vant undir trimum venjarum higartil í fyrstu deild.
- Eg var eitt sindur við, tá Tony Paris var her í 1999. Og so havi eg vant undir Tomislav Sivic og nú Kurt Mørkøre.
Hann sigur, at hann altíð hevur droymt um at verða fótbóltsspælari, men nú er tað ikki tað, sum upptekur hann mest. Nú er hann so smátt farin at hugsa um at fáa sær eina útbúgving.

- Eg veit ikki rættiliga, hvat eg kundi hugsað mær. Eg eri nullstillaður beint nú, tí fótbóltsárið er farið aftur um bak, og nú fari eg at umhugsa, hvat eg vil í framtíðini. Men eg hugsi ofta, at um eg var 16 í dag, og eg fekk møguleikan at fara uttanlands í fótbólti, so hevði eg ikki ivast. Eg hevði lopið avstað, men tað er øðrvísi í dag, sigur hann hugsunarsamur.

Hjalgrím hevur verið og royndarvant við Premier League feløgunum Aston Villa og Bolton.

## Onnur feløg

Tað er lítið at dylja yvir, at ein so ungur og evnaríkur leikari, sum Hjalgrím Elttør er ein sera áhugaverdur fongur hjá einum fótbóltsfelagið. Og tí kann tað ikki komast rundan um spurningin, um hann yvirhøvur verður millum KÍ leikararnar komandi kappingarár.

- Tað verður tosað sera nógv, serliga tí kappingarárið júst er endað, og avgerðir skulu takast um komandi ár. Og feløg hava ringt til mín, men enn er so stutt fráliðið, so tað er bert prát enn. Eg vil í veruleikanum ikki fara úr KÍ, tí eg haldi ikki, at tað er so stórur munur á teimum føroysku feløgunum, heldur Hjalgrím.

Gentan hjá Hjalgrími, Birgit, arbeiðir í Havn og spurdur um, hann møguliga verður at síggja í øðrum av høvuðsstaðarfeløgunum komandi ár, sigur hann, at tað sum er ikki er nakað fastlagt.

- Eg eri framvegis í hópinum hjá KÍ, og tað er eisini har eg helst vil verða. Men sjálvandi kann tað fyri onnur tykjast, sum um Havnin virkar lokkandi fyri meg, tá daman arbeiðir har.

Hann sigur eisini, at fólk spyrja hann allatíðina, um hann fer aðrastaðni.

- Tey spyrja: Fert tú veruliga at skifta felag? Akkurát, sum um tað er nakað øgiligt nakað. Og til tíðir kann tað vera sera ørkymlandi, tí ein verður forvirraður av, at øll onnur blanda seg uppí.

Áskoðararnir hjá Kí eru ein av teimum mest trúføstu í landinum, men tey eru eisini eirindaleys. Um tað gongur væl, so er alt gott. Men gongur tað so hinvegin, so er tað ikki við mýkindum.

- Tá ein er á vøllinum, so fangar ein fyri tað mesta alt tað negativa sum verður sagt ella rópt. Men eg haldi ikki, at tað verður tikið illa upp. Vit eru so lokal her norðuri, at vit kenna áskoðararnar. Onkuntíð flenna vit bara eftir tí, sum verður sagt, sigur Hjalgrím sum ikki vil taka nakran fram um onnur, men hann nevnir stuðlarnar, sum hava verið til hvønn dyst íklæddir hvít og blá klæðir, við trummum og hornum.

- Teir gera sanniliga sítt til, at dystirnir ganga væl, tað er sera hugaligt at hoyra teir rópa á okkum, sigur Hjalgrím, sum nú kappingarárið er farið afturum bert fer at slappa av fyri fyrst og umhugsa, hvat hann vil í framtíðini






| | |
|---|---|
| **Navn:** | Hjalgrím Elttør |
| **Aldur:** | 19 ár |
| **Starv:** | Krambakallur í Statoil |
| **Føðingardagur:** | 03.03.1983 |
| **Yndisorð:** | Hugflog |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stórur, tá tú vart lítil?** | Fótbóltsspælari |